# Sjúkrarøktin er komin til eitt vegamót

**Í sambandi við at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðing-ar helt sín 15 ára føðingardag, var ráðstevna um vikuskiftið. Norðurlandahúsið var karmur um ráðstevnuna, ið bar heitið Sjúkrarøktin á vegamóti.**

SJÚKRARØKT
*Torkil V. Rasmussen*

Endamálið við ráðstevnuni var at menna vitanargrundarlagið, fakliga samleikan og góðskuna í sjúkrarøktaryrkinum, soleiðis at eitt íkast til at skapa nýhusan og menning verður givið lesandi og starvandi í sjúkrarøktarfakinum.

Salurin var hálvur leygardagin, og vóru tað kvinnurnar, sum høvdu tann sterka merilutan á ráðstevnuni.

Eitt tað mest alment viðkomandi á ráðstevnuni var kjakið leygardagin har umboð frá Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Almannamálaráðnum, Sjúkrarøktarfrøðisskúla Føroya, Landssjúkrahúsinum og Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar vóru til staðar um pallborðið. Orðstýrari var Bjørt Samulesen.

Kjakið fevndi í størstan mun um, hvussu fígging og menning skuldi geva fakinum betir kor.

Tosað var at geva sjúkrarøktarfrøðingum møguleika fyri hægri útbúgvingum her á landi. Hildið var eisini at umstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum ikki eru nøktandi. Umboðini fyri fakbólkarnar vóru á einum máli um, at tørvurin eftir sjúkrarøktarfrøðingum fór at gerast størri í framtíðini. Tískil er av størsta týdningi, at bøtt verður um vandan nú, meðan tíð til tess er.

Vit hava ein trupulleika í føroyska heilsuverkinum, tí tað er sera trupult at finna avloysarar til starvið sum sjúkrarøktarfrøðingur. Fleiri føroyingar við útbúgvingini hava heldur valt at seta síni fótafet í øðrum londum. Harvið kann staðfestast, at vit av sonnum mugu byggja upp fyri, at lønin og umstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum gerast betri hildu umboðini fyri fakbólkarnar.

Millum umstøðurnar hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ið mugu betrast, er møguleikin at endurútbúgva seg, og harvið gerast dagførdir við nútímans uppgávum, siga tey, ið umboðaðu feløgini.

Millum áhoyrarnir vóru spurningar settir pallborðinum, og varð tá sagt av einum av áhoyrarunum, at tað hevur kostað um tær 80.000 kr,- at endurútbúgva seg til av sonnum at kunna dagføra seg í fakinum. Í núverandi støðu var bert møguleigt at taka stigið einsamallur. Tvs. Um endurútbúgving var ynskilig, so er tað upp til hin einstaka sjúkrarøktarfrøðiginum at taka stigið.

Plásstrot er eisini eitt lyklaorð, tá ið vent verður ímóti núverandi umstøðum, tí høli eru einfalt ikki til taks, um endurútbúgvingarnar skulu veitast í Føroyum. Stutt sagt vildu áhugabólkarnir fáa fleiri pengar játtaðar til tess.

Til síðst helt Jógvan Fríðriksson prestur fyrilestur um týdningin av góðum samskifti, góðum avrikum og tryggleikan hjá einstaka sjúklinginum. Hann vildi m.a. verða við, at samskiftið á einum arbeiðsplássi sum heilsuverkið er av størsta týdningi, tá ið hugsað verður um trivnaðin hjá sjúklinginum. Hann segði, at eftirmetingin hjá tí einstaka sjúklinginum av einari viðgerð á sjúkrahúsinum fevnir seg í størstan mun um, hvussu trivnaðurin og samskiftið millum læknar og sjúkrarøktarar á sjúkrahúsinum var.

Hann legði aftrat, at í nútíðar samfelagnum er gott samskifti eitt tað mest týdningarmikla lyklaorðið sum finnst á øllum arbeiðsplássum.

Til endans rundaði forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Jana H. Dalsgaard, ráðstevnuna av.

Samanumtikið var luttøkan góð og ráðstevnan sera væleydnaða, og fólk fóru avstað við teirri fatan, at nógv munagott og mennandi var komið burturúr.




## Móttøka

Bjóðað verður til móttøku
í hølunum hjá S&K-felagnum
á Traðavegi 20
í samband við at S&K-felagið
18. oktober hevur 30 ára stovningardag

Tað hevði glett okkum at sæð limir,
samstarvsfelagar, viðsiftafólk,
vinir og kenningar

Móttøkan verður:
fríggjadagin 17. oktober
frá kl. 15.00 – 18.00

S&K-felagið

Sosialurin 341800

# Tekna títt egna telefonkort

TÍÐINDASKRIV

Telefyritøkan Kall er nú farin undir eitt tiltak, ið loyvir áhugaðum at seta sítt fingramerki á sniðgevingina av nýggju talutíðarkortunum, ið gerast skulu í næstum. Talan er framvegis um kort áljóðandi 50, 100 og 250 krónur, men munurin á gomlu og nýggju kortunum kann sita undir liðini á tær nú.

Kall útskrivar við hesum eina kapping, har øll við einum myndatóli og einum góðum hugskoti kunnu luttaka. Ætlanin er nevniliga, at myndir, ið vanligi føroyingurin hevur tikið av vinum og kenningum, familjuni, sjeikinum ella bara av einari stuttligari støðu, skulu mynda nýggju talutíðarkortini hjá Kalli. Og hevur myndin nakað at gera við telefonir á ein ella annan hátt, ger hetta jú heldur einki..

Besta myndin verður lønt við einari virðisløn áljóðandi 5.000 krónur, nummar tvey fær eina Nokia 2100 við Frælsi haldi frá Kalli, og nummar trý fær eitt myndatól frá Fotobúðini í Handilskjarnanum.

Fyri at luttaka í kappingini, skal negativið av myndini sendast til Fotobúðina í Handilskjarnanum, Niels Finsensgøta 8, FO 100 Tórshavn. Tað er sera týdningarmikið, at tey, sum lata negativið inn, leggja tað í ein brævbjálva, har navn, bústaður og telefonnummar verður skrivað á, soleiðis at eingin ivi er um, hvør ið hevur latið inn.

Eisini skulu tey, ið eru á myndini, góðtaka, at myndin verður nýtt.

Tær bestu av innkomnu myndunum verða lagdar út á heimasíðuna www.kall.fo, har ein og hvør kann fara inn og avgera, hvørjar myndir verða nýttar á talutíðarkortunum.



# Landsstýrismaður klagaður til løgmann

**Sinnisbati hevur kært avgerð um at flyta pengar, sum settir eru á fíggjarlógina til sinnisveik, á aðrar konti hjá Almannamálaráðnum**

PSYKIATRI
*Edvard Joensen*



*–Vit hava kært landsstýrismannin við almannamálum til løgmann fyri embætisførslu hansara í samband við at flyta øðrum pengar, sum markaðir eru til sinnisveik, sigur Soffi Egholm, formaður í Sinnisbata*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsstýrismaðurin við almannamálum loypir upp um, har garðurin er lægstur. Hann letur tey sinnisveiku vera fyri vanbýti, tí tey mótmæla ikki, sigur formaðurin í felagnum Sinnisbata, Soffi Egholm. Málið verður reist við fyrispurningi í Løgtinginum i dag.

Soffi Egholm sigur, at hon vegna felagið Sinnisbata hevur kært viðgerðina hjá landsstýrismanninum við almannamálum og parti av umsiting hansara í einum máli, har peningur, sum á fíggjarlógini var settur av til fólk við sálarsjúku, er fluttur og brúktur í øðrum sambandi.

Hon vísir til eina fundarfrásøgn, har ein stovnsleiðari undir Almannamálaráðnum verður endurgivin fyri at siga, at hann ikki hevur ringa samvitsku av at hava brúkt pengar hjá sinnisveikum til fólk við heilaskaða.

– Hetta er so viðgjørt á einum fundi, har Sinnisbati ikki hevur fingið fundarboð. Tað haldi eg vera í so langt úti, sigur Soffi Egholm.

– Ikki tað, at eg ikki unni teimum pengarnar, tí tað geri eg. Men so skulu teir setast av til tey fólkini og ikki takast frá øðrum, sum ikki fáa vart seg. Vit vilja krevja tað, sum okkum tilkemur, og tað hava vit sagt løgmanni í kæruni, vit hava sent honum.

Kæran er nýliga send, og formligt svar er ikki komið frá løgmanni, sigur Soffi Egholm. Men hann hevur í telefonsamrøðu váttað, at orðalagið í fundarfrásøgnini, víst verður til, er rætt.

Málið verður tikið upp á politiskum støði í dag, tá Kristian Magnussen, løgtingsmaður, fer at seta fram fyrispurning í Løgtinginum um, hvar hesir pengarnir eru farnir, sigur Soffi Egholm.

# Stórur áhugi fyri Sinnisbata




*Heilt nógv folk hava víst kunningarátakinum hjá Sinnisbata rættiliga stóran áhuga, sigur formaðurin í felagnum, Soffi Egholm*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Undirtøkan fyri tiltøkunum hjá Sinnisbata í Havn fríggjadagin var stórur. Og heilt nógv fólk hava vent sær til felagið í døgunum áðrenn og aftan á tiltakið**

PSYKIATRI
*Edvard Joensen*

Fólk vita sum heild lítið um viðurskiftini hjá sálarsjúkum í Føroyum og eru skelkað, tá tey frætta um, hvussu illa stendur til, sigur formaðurin í Sinnisbata, Soffi Egholm.

Eini 200 fólk vóru til pallborðsfundin, sum Sinnisbati skipaði fyri á Platform fríggjadagin. Og til kravgonguna og tiltakið á Vaglinum vóru enn fleiri, sigur formaðurin i felagnum.

Men tað eru øgiliga nógv fólk í Føroyum, sum ikki hava minsta ánilsi av, hvussu illa tað stendur til á økinum, sigur hon. Tað prógva allar tær samrøður og viðmerkingar annars, hon hevur fingið seinnu tíðina. Serliga nú nógv hevur verið gjørt burtur úr at kunna um støðuna í fjølmiðlunum.

Hon vísir á, at hesi fólkini, hvørs sak Sinnisbati talar, eru ikki tey, sum rópa harðast og seta størstu krøvini. Og myndugleikarnir gera sítt til at taka alla sjálvsvirðing frá teimum.

Til dømis skulu tey klára seg við 700,- krónum í lummapeningi um mánan. Og 1.000,- krónur fáa tey um árið til klæði. So tann sum frammanundan er illa fyri sálarliga, verður ikki betri av slíkari viðferð frá teimum, sum áttu og skuldu verið teirra stuðlar, sigur Soffi Egholm.

Hetta er eitt eymt mál, sum kropið hevur verið uttanum í longri tíð og tí eisini hevur ligið í dvala. Men nú kom knappliga røringur í, og heilt nógv fólk vilja vita meira um hetta økið, sigur hon.

Soffi Egholm fegnast um tann áhuga, málið nú hevur fingið, og vísir á, at júst hetta var eisini endamálið við tí kunningarátakið, sum verið hevur. Og nú fer Sinnisbati so at halda fram at koyra á politiska myndugleikan fyri at royna at fáa skapt teimum sinnisveiku í Føroyum betri umstøður.

# Hotel Vágar yvirtekur Rio Bravo



*Hotel Vágar yvirtekur matstovuna Rio Bravo í morgin*

**Horel Vágar hevur flutt annað beinið til Havnar. Mikudagin yvirtekur hotellið matstovuna Rio Bravo**

MATSTOVUVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Hotel Vágar fær nú eina deild í havn. Tað er matstovan Rio Brao, sum hotellið yvirtekur i morgin.

Uni Danielsen, stjóri á Flogfelag Føroya, sum eigur Hotel Vágar, sigur, at avtalan umfatar bara sjálva matstovuna Rio Bravo. Hini bæði støðini, sum eru í sama bygningi, halda fram við somu leiðslu sum higartil.

Broytingar verða ikki í fyrsta umfari aðrar enn, at Mouldi Manai, sum hevur rikið Rio Bravo, verður skiftur út við leiðaran á Hotel Vágum, Kára Hentze, sum nú fer at vera leiðari á Rio Bravo eisini. Starvsfólkið annars verður tað sama sum fyrr.

Í fyrsta umfari verður hildið fram á júst sama hátt sum higartil, sigur Uni Danielsen. Jólaborðhaldini eru nakað nær, og eingin grund er til at fara at broyta nakað soleiðis her og nú. Hvat seinni kann fara at vísa seg, vil hann ikki siga nakað um nú.

Uni Danielsen sigur hetta vera eina nátúrliga víðkan av virkseminum hjá Hotel Vágum. Nú hevur hotellið fingið eitt bein í Havn, og tað er jú eingin forðing fyri tøttum samstarvi millum bæði støðini longur, nú fast samband er undir Vestmannasundi.

– Og hvør veit. Kanska kann tað gerast til, at fólk fara at flyta ímillum eisini og á tann hátt fáa fleiri spennandi og fjølbroyttar uppgávur, sigur hann.

Matstovan fer at hava sama navn og somu innrætting eisini í framtíðini. Uni Danielsen vil ikki upplýsa prísin, sum liggur ímillum.